## Sól og summar á Gøtusandi

– Hugnaløta fyri stór og smá

SUMMAR
*Gøtu Menningarfelag*

Í dag, leygardagin, skipar Gøtu Menningarfelag fyri hini vælumtóktu hugnaløtuni við stórum báli og øðrum spennandi tiltøkum á sandinum í Syðrugøtu.

Byrjað verður kl. 14 við at børn sleppa at sita á rossabaki (ponyríðing).

Kl. 15.30 verður Fjallarenning. Hetta er kapping í at renna/ganga niðan á Støðlafjall og omanaftur upp á tíð. Tríggir teir skjótastu luttakararnir fáa steyp til ognar, og vinnarin fær eisini stórt og vakurt ferðasteyp. Byrjað verður á Gøtueiði, og málstrikan er á sjálvum sandinum í Syðrugøtu. Tey, ið hava hug at taka lut í fjallarenningini, kunnu tekna seg á tlf. 441484 ella 442026.

Eisini verður Tombola og Fiskibrunnur.

Uml. kl. 16.30 fara ung, konur og menn úr Norðragøtu og Syðrugøtu at toga tog móti hvørjum øðrum. Kappast verður um stór ferðasteyp.

Ongum nýtist at ganga svangur á sandinum, tí umframt pylsur og sodavatn, verður eisini kaffi og køka at fáa.

Uml. kl. 17.30 fer felagskórið Gøta/Leirvík at syngja summarsangir, og nýggi borgarstjórin, Haldóra Ranghamar, fer at halda røðu.

Síðani verður kynt í tað stóra bálið á sandinum, og tá verður felagssangur. Heitt verður í hesum sambandi á fólk um at hava grønusangbók við.

Gøtu Menningarfelag væntar, at tað fara at koma eins nógv fólk sum undanfarin ár; tí hetta tiltakið er vorðið ein fastur táttur í summarhugnanum hjá smáum og stórum eysturoyingum og eisini nógvum fólki aðrastaðni frá.

Óneyðugt er helst at nevna, at tað sjálvandi er ókeypis at koma á Gøtusand leygardagin.

So sjálvandi síggjast vit í Gøtu leygardagin.



# Stavanger vil rætta føroyingum hjálpandi hond



*Høvdingar hittast. Jan Christiansen, býráðsformaður býður norska starvsfelaga sínum, Leif Johan Sevland úr Stavanger vælkomman til Føroya.*

*Mynd Jan Müller*

OLJUVINNA
*Jan Müller*

Hesar seinastu dagarnar hevur stór sendinevnd úr Stavangerøkinum vitjað í Føroyum – við sjálvum borgarstjóranum, Leif Johan Sevland á odda. – Vit eru komin til Føroya fyri at bjóða okkum fram í komandi oljuvinnuni. Í tann mun føroyingar ynskja samstarv og samarbeiði við virki, stovnar og fyritøkur í Stavanger og økjunum nærhendis, og tit vilja hava góð ráð, eru vit fús til slíkt sigur ein rættiliga fryntligur og avgjørdur borgarstjóri. Hann heldur tað vera rætt av føroyingum at vilja stýra og leggja útviklingin til rættis sjálvar men heldur eisini, at norðmenn kunnu geva eitt gott íkast til komandi gongdina við sínum 30 ára royndum og vitan frá hesi vinnu. Seinastu dagarnar hava vinnulívsfólk, skúlafólk og politikarar úr Stavangerøkinum vitjað starvsfelagar í Føroyum. Tórshavnar kommuna við borgarstjóranum Jan Christiansen á odda hevur verið vertur, nú talan er um vinarbýir. Á samkomu í býráðssalinum hósdagin beyð Jan Christiansen stavangerfólkinum at verða hjartaliga vælkomin í Føroyum og helt fyri, at føroyingar eru avgjørt sinnaðir til at menna samstarv við norðmenn, eitt nú at keypa vørur og tænastur frá teimum í sambandi við komandi oljuvinnuna, um hesar eru kappingarførar í prísi og dygd. Hann metti tað vera rætt við eini breiðari samvinnu, ikki minst tí at vit froyingar kunnu læra nógv av norsku royndunum.

